# Pedagogar

Í Barnagarðinum á Teiginum heima á Sandi sóknast vit eftir tveimum pedagogum at arbeiða 30 tímar um vikuna. Størvini, íð setast skulu, eru:

30 tímar/viku í útibarnagarðsbólkinum "Lítla Teigi", har eru 23 børn í aldrinum 4 – 7 ár.
30 tímar/viku í skúlabólkinum, har eru 7 børn í aldrinum 7-8 ár.

**Krøvini til tín eru:**

- at tú er fyrikomandi og erligur
- at tú dugir at arbeiða sjálvstøðugt og ábyrgdarfult í samráð við børnini
- at tú heldur arbeiði við børnum í ávikavist 4-7 og 7-8 ára aldri vera spennandi og avbjóðandi
- at tær dámar at verða úti í øllum veðrið
- at tú dugir at síggja møguleikar heldur enn avmarkingar
- at tú er nærverandi og dugir at lurta

**Børnini vilja:**

- at tú dugir at spæla fótbólt
- at tær dámar at ganga túrar á fjall og í fjørðu
- at tú dugir ymisk dreingja- og gentuspøl
- at tú dugir at fanga krabbar eins væl og spæla við Barbiedukkur
- at tú dugir at reypa og siga søgur

Góðir møguleikar eru at nýta fimleikahøll og fótbóltsvallir í arbeiðinum.

Starvið verður lønt smb. sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.
Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til Lailu M. Petersen, stovnsleiðara á tlf. 361750/270720.

Skrivlig umsókn skal sendast til Sjálvsognarstovnin Barnagarðin á Teiginum, FO-210 Sandur. Umsóknarfreistin er úti 01.02.05. Størvini verða sett 15.02.05. Allir umsøkjarar fáa svar. Í løtuni røkja hjálparfólk størvini.

**Sjálvsognarstovnurin**
**Barnagarðurin á Teiginum**

# Grundskeið í lóg

Í vár skipar Søgu- og Samfelagsdeildin á Fróðskaparsetri Føroya fyri undirvísing í grundskeiði í lóg. Grundskeiðið er 15 ECTS, ið svarar til 1/4 ársverk. Skeiðið fevnir um ein almennan part, ið verður settur saman av pørtum sum: *at finna lóg, at skipa lóg, at smíða lóg, at tulka lóg* og einum serligum parti settur saman av *brotum úr galdandi stjórnar- og fyrisitingarlógum, serliga stýrisskipanarlógini, heimastýrisskipanini, ríkisgrundlógini, fyrisitingarlógini og innlitarlógini.*

Skeiðið er ætlað lesandi á setrinum, fólki við aðrari hægri útbúgving enn í løgfrøði, fólki við fyrisitingarligum royndum, ið hava tørv á eftirútbúgving, men onnur kunnu eisini, um pláss verður, skriva seg inn. Fyritreytin er tá ein miðnámsútbúgving ella samsvarandi.

Undirvíst verður tvær ferðir tveir tímar um vikuna, týskvøld og hóskvøld, kl. 18-20 í hølum setursins á Føroya Sjómansskúla.

Undirvísingin byrjar týsdagin 1. februar 2005 og endar við skrivligari próvtøka hósdagin 2. juni 2005.

Lærarar verða løgfrøðingarnir Kári á Rógvi, Birita L. Poulsen, Heðin D. Poulsen, Jógvan Elias Winther Poulsen og Jonhard Klettheyggj.

Kostnaður fyri skeiðið, íroknað skeiðstilfar, er kr. 3.000. Harafturat kemur próvtøkugjald kr. 1.000.

Umsóknarbløð fáast við at venda sær til Søgu- og Samfelagsdeildina, J.C.Svabosgøtu 7, 100 Tórshavn, tlf. 352580 ella á heimasíðuni www.setur.fo

**Umsóknarfreistin er sett til hósdagin 27. januar 2005.**

## HONDA CRV 4x4 2.0 i



Árg. 1999 · Koyrt 122.000 km. · Ongantíð roykt í bilinum · Sera vælhildin · Rúmligur · Við króki

**Bíliga til sølu** **Tel 77 54 37**

# GSM telefonir

Nokia - Siemens - Motorola
Ericsson - Panasonic

# Tráðleysar

Siemens Dect.
Kunnu ikki avlurtast

# Til skip og bátar

NMT 450 - VHF telefonir v.m.

Storno
SØLA & TÆNASTA
Handan Á 6 - 100 Tórshavn
Tel. 314414 - Fax 318045

# Skeið í 1. hjálp

Um undirtøkan er nóg stór, skipar Reyði Krossur Føroya fyri:

**Grundskeiði, 12 tímar, í 1. hjálp:**
12., 13. og 19. februar
**Víðkaðum skeiði, 20 tímar í 1. hjálp:**
byrjað verður 20. februar

Treyt: Grundskeið ikki eldri enn 3 ár.

Tilmelding á tlf. 319630
mikudag kl. 14-16 og kl. 19-21
Teldupostur: redcross@redcross.fo

www.sosialurin.fo

# Bilmekanikari

Søkt verður eftir bilmekanikara at byrja sum skjótast.

Áhugað kunnu venda sær til Heðin ella Finnboga.

**Pf. Meinhardt Arge**
**Tlf. 345400**

# Radioskeið ROC

verður á Sandoyar Meginskúla í næstum. Tilmelding á tlf. 361038 ella hjá Radioeftirlitinum, tlf. 356020.

Luttøkugjald kr. 150,-.

**Sandoyar Kvøldskúli**

# Vága Sjúkrakassi

**Sambært grein 28 í høvuðssamtykini, verður lýst til val í Sandavági 16. februar 2005.**

Veljast skulu 1 umboð fyri Miðvág, 1 fyri Sørvág, 1 fyri Bø og 1 fyri Mykines.

Uppskot til umboð skulu skrivliga vera sjúkrakassanum í hendi í seinasta lagi 2. februar 2005.

# Almennur

føroyskur dansur verður í Bygdarhúsinum í Hósvík 22. januar frá kl. 22.00.

Kostnaður er 60 kr. Breyð, kaffi og te eru íroknað atgongumerkið.

**Bygdarfelagið Varðin**
**Hósvík**